Avtala

millum

Føroya Arbeiðsgevarafelag / Føroya Handverksmeistarafelag
og
Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna

Omanfyri nevndu partar eru samdir um niðanfyri standandi broytingar.

Kondittarar verða løntir á sama hátt sum bakarar fyri at arbeiða forskotna tíð, frá kl. 4.00 til kl. 6.00.

Fyri bakara- og kondittaralærlingar verður viðbótin sunnu- og halgidagar kl. 00.00-24.00 (alt døgnið) og frídagar broytt úr 18,89% til 35%.

Broytingarnar koma í gildi 1. mai 2024.

**Í høvuðssáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar**:

1. Heitið á Grein 18 verður broytt til at ljóða soleiðis:

   "*§ 18.*
   *Forskotin tíð (bakarar, kondittarar og servicefak)*"

2. Grein 18, stk. 1 verður broytt til at ljóða soleiðis:

   *"Stk. 1. Bakarar og kondittarar*

   *Fyri at arbeiða frá kl. 4.00 til kl. 6.00 fáa bakarar og kondittarar 55% av vanligari sáttmálaløn sambært §10 eyka um tíman vanligar yrkadagar og 70% av vanligari sáttmálaløn sambært §10 eyka leygardag og halgidagar."*

**Í lærlingasáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar**:

Grein 15 verður broytt til at ljóða soleiðis:

*"Fyri arbeiðir innanfyri hesi tíðarskeið verða goldnar hesar viðbøtur (forskotin tíð). Viðbøturnar verða roknaðar av serarbeiðaraløn á 1. árið.*

| ***Yrkið*** | ***Tíðarskeið*** | ***Viðbót 1. Mai 2024*** |
|---|---|---|
| *Bakara- og kondittaralærlingar* | *Allir dagar millum kl. 18.00-04.00* | *26,45%* |
| | *Sunnu- og halgidagar kl. 00.00-24.00 (alt døgnið) og frídagar* | *35%* |
| *Kokka- og tænaralærlingar* | *Gerandisdagar kl. 18-06* | *3,03%* |
| | *Leygardagar, sunnu- og halgidagar* | *4,16%* |
| *Frisørlærlingar* | *Sunnudag* | *Verður goldið eins og yvirtíð hjá lærlingum* |

Tórshavn, hin 1. mail 2024

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá

**Føroya Handverkarafelag**

Suni Simonsen

**Føroya Handverksmeistarafelag**

Magnus Magnussen

**Landsfelag Handverkaranna**

~~Dánjal Pauli Djurhuus~~ ELI BRIMSVIK